# Leiðreglur fyri at veita stuðul á mentanarøkinum hjá Tórshavnar kommunu



**§ 1 Endamál**

Stk. 1. Endamálið við játtanini er at stuðla verkætlanum, tiltøkum og átøkum, sum ríka og menna mentanarlívið í kommununi. Stuðul verður veittur samsvarandi játtan á fíggjarætlan kommununnar av hesum kontum:
5362 Stuðul til sjónleik, 5363 Stuðul til tónleik, 5364 Stuðul til mynd- og filmslist, 5365 Stuðul til ítrótt og 5366 Stuðul annars.
Aðrar leiðreglur eru fyri játtan av stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

Stk. 2. Sum meginregla stuðlar kommunan virksemi, ið hevur tilknýti til kommununa ella er kommununi til gagns.

**§ 2 Verkætlanir, tiltøk og átøk, sum kunnu fáa stuðul**

Stk. 1. Stuðul kann verða latin til verkætlanir, tiltøk og átøk innan hesi endamál:

a) Listarligt og mentanarligt virksemi sum t.d. framsýningar, framførslur, konsertir og bóka- og tónleikaútgávur.
b) Fyriskipan av ráðstevnum, seminarum v.m. um mentan og list.
c) Frítíðarvirksemi sum t.d. ítrótt og skótar.

**§ 3 Raðfestingar**

Stk. 1. Mentamálanevndin setur á hvørjum ári upphædd av til ávíst stuðulsøki. Endamálið er at raðfesta og kveikja nýskapan innan mentan og list.

**§ 4 Umsókn og treytir**

Stk. 1. Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar so hvørt tær koma inn. Mentamálanevndin viðger stuðulsumsóknir á regluligu fundum sínum. Umsóknirnar skulu tó sendast inn í góðari tíð og vera kommununi í hendi í seinasta lagi 6 vikur, áðrenn tiltakið verður.
Kunnað verður á heimasíðu kommununnar um stuðulsmøguleikarnar.

Stk. 2. Umsókn skal verða skrivað á serstakt umsóknarblað, sum kann heintast á heimasíðu kommununnar.

Stk. 3. Stuðul verður ikki latin til verkætlanir, sum eru lidnar, ella tiltøk og átøk, sum hava verið.

Stk. 4. Kommunan kann biðja umsøkjara, sum fær stuðul, um at lata kommununi frágreiðing við roknskapi, tá tiltakið er lokið. Hetta verður gjørt saman við fráboðan um játtaðan stuðul.

Stk. 5. Møguligur ónýttur peningur verður at rinda kommununi aftur, og kommunan kann somuleiðis krevja stuðul afturgoldnan, hevur verkætlanin ella tiltakið havt avlop.

Stk. 6. Játtaður stuðul er galdandi í 3 mánaðir eftir, at tiltakið ella verkætlanin eru liðug. Til størri verkætlanir er játtanin galdandi í 12 mánaðir, ella tá virksemið kann væntast at vera liðugt. Hetta er galdandi, um ikki annað er avtalað.

Stk. 7. Álagt verður umsøkjarum, sum fáa stuðul, at tilskila á uppsløgum, í skráum og aðrastaðni, har tað ber til í sambandi við tiltakið, at Tórshavnar kommuna hevur veitt tiltakinum/verkætlanini stuðul.

**§ 5 Viðgerð og avgerð um stuðul**

Stk. 1. Mentamáladeildin tekur ímóti umsóknum og fyrireikar tær til viðgerðar. Tá søkt verður um stuðul, ið er meira enn kr. 12.000,- verður málið beint í mentamálanevndina, ið tekur avgerð.

Stk. 2. Mentamáladeildin saman við trivnaðarstjóranum viðger og tekur avgerð samsvarandi krøvum í hesi reglugerð, tá stuðulsupphæddin er í mesta lagi kr. 12.000,-. Málini verða latin mentamálanevndini til kunningar.

**§ 6 Aðrar treytir**

Stk. 1. Atlit skulu takast til umhvørvi og umhvørvisvernd.

Stk. 2. Atlit skulu takast til fyribyrging í mun til børn og ung í sambandi við rúsdrekka.

Stk. 3. Mentamálanevndin kann, um serligar umstøður tala fyri tí, víkja frá ásetingunum í hesum leiðreglum.

Stk. 4. Hesar leiðreglur koma í gildi dagin eftir, at mentamálanevndin hevur samtykt tær.



Leiðreglur samtyktar av Mentamálanevnd Tórshavnar
Býráðs 3. september 2015, broyttar 11. september 2019.

**Mentamáladeildin**

Postboks 32 • FO-110 Tórshavn